## Kirkjugarður vígdur

Í góðveðrinum fríggjadagin varð ein partur av kirkjugarðinum í Klaksvík vígdur. Talan er um eitt øki har pláss verður fyri 220 gravplassum. Vígslan fór fram eftir eina jarðarferð, og vóru tað rættuliga nógv fólk sum valdu at verða við til vígsluna.



## Arbeiða í tunli

Hóast teir eru komnir væl á leið, er enn nakað av arbeiði eftir at gera í tunlinum. Av Landsverki verður upplýst at restina av hesum mánaðinum verður arbeitt millum kl. 24 og 6. Fyri at lætta um hjá bilførarum verður ferðslan leidd ígjøgnum við ljósregulering hesar tímarnar.

# Navn títt er ... Korndalsgarður

**Hvítusunnudag var hátíðarløta í Eiðis skúla, tá vinnararnir av tveimum kappingum vórðu avdúkaðir. Nú hevur skúlin í bygdini fingið búmerki og barnagarðurin navn**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Væl nøgdir vinnarar og umboð fyri kommununa - vinstrumegin Tom Joensen, bygdaráðslimur; Birgit av Lofti (umboðaði mannin, Svenning av Lofti); Magnus Magnussen vinnari av búmerkjakappingini; Norma K. Egholm; Øssur Egilstrøð, vinnari í búmerkjakappingini; Anna Sofía Kristiansen og Tordur Niclasen, borgarstjóri*

*Mynd: eidi.fo*

*Eiðis skúli hevur nú fingið nýtt búmerki*

**Eiði:** - Vit eru sera bilsin av stóru undirtøkuni, sigur Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði.

Tað var við spenningi, at Eiðis kommuna skrivaði út kapping um búmerki til skúlan og navn til nýggja barnagarðin, sum skal takast í nýtslu seinni í summar.

Tá freistin at senda uppskotini inn vóru ikki færri enn 109 uppskot komin til navnakappingina og 23 til kappingina um búmerkið.

Hesi eru øll síðani viðgjørd í serligari dómsnevnd, og nú var stundin komin at avdúka hvør átti vinnandi uppskotini.

Dómsnevndin kom fram til, at Øssur Egilstrøð gjørdist vinnari av navnakappingini við heiti sínum "Korndalsgarður". Hetta er í sama lagi sum eldrasambýlið í nánd av barnagarðinum og sum kallast Korndalsbýlið.

Hesin sami Øssur Egilstrøð hevði eisini gjørt uppskot um búmerki til skúlan. Hansara uppskot gjørdist nr. 2, meðan tað hjá Magnusi Magnussen varð kosið sum tað besta.

### Hugnalig løta

Kappingin um navn til barnagarðin og búmerki til skúlan endaði 6. mars, tá uppskotini skuldu vera inni.

Síðani tá hevur ein dómsnevnd viðgjørt øll hesi mongu uppskotini, og gjørdi tilmæli til bygdaráðið sum tók støðu til hetta á seinasta fundi sínum.

Sum skilst hava fólk verið sera fantasifull at finna uppá bæði nøvn og búmerki.

Í dómsnevndini fyri búmerki til skúlan sótu Hanna Andreasen, Tom Joensen og Tordur Niclasen, meðan Hans Erland í Brekkunum, Tom Joensen og Tordur Niclasen sótu í nevndini sum viðgjørdi navn til barnagarðin.

Tá nøvnini vórðu avdúkað varð nógv gjørt burturúr í skúlanum. Her vóru bæði tónleikur, røður og felagssangur, eins og ein góður drekkamunnu til børn og vaksin.

- Tað var eisini sera hugaligt, at nógv fólk møttu til hetta tiltakið, sigur borgarstjórin á Eiði.

**Vinnarar av kappingunum**

**Inn komu 109 uppskot um navn og 23 um búmerki.**
**Vinnarar um navn til barnagarðin gjørdust:**

1. **Øssur Egilstrøð við navninum "Korndalsgarður"**
2. **Anna Sofía Kristiansen við navninum "Sóljugarður"**
3. **Svenning av Lofti við navninum "Hólmagarður"**

**Vinnarar av búmerkjakappingini gjørdust:**

1. **Magnus Magnussen**
2. **Øssur Egilstrøð**
3. **Norma K. Egholm**

# Skil fáast á stuðulin

**Fuglafjarðar kommuna ætlar at lætta um viðgerðina av øllum teimum mongu umsóknunum um stuðul, sum Mentanarnevndin fær millum ár og dag frá feløgum, einstaklingum og felagsskapum**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Fuglafjørður hevur fingið eitt amboð at stýra stuðulspolitikki sínum*

**Fuglafjørður:** - Nú hava vit endiliga fingið eitt amboð til at viðgera allar hesar mongu umsóknirnar, verður sagt úr kommununi.

Eins og so mangar aðrar føroyskar kommunur, fær tann í Fuglafirði eisini ein hóp av umsóknum um stuðul til mong ymisk góð og viðkomandi endamál.

Trupulleikin hevur bert verið, at ein hevur ikki havt nakra mannagongd á hesum øki.

Ella sum nevndin sjálvur tekur til: - Einasta stavnhald hjá nýggjum nevndum er møgulig siðvenja frá undanfarnum nevndum.

- Og hetta hevur ikki verið mett nøktandi, sigur Mentanarnevndin í Fuglafirði.

Á fundi í mars mánaði viðgjørdi nevndin eitt uppskot til nýggjan stuðulspolitikk, og á býráðsfundi í farna mánaði varð henda reglugerðin samtykt.

- Endamálið er at skipa arbeiðið við stuðli, soleiðis at tað verður lættari at umsita, samstundis sum sannlíkindini fyri at býta pengingin skilagott og rættvíst gerst størri, verður sagt.

Stuðulspolitikkurin hjá Fuglafjarðar kommunu er í roynd og veru býttur í trý endamál.

Í fyrsta lagi er endamálið at lýsa til hvønn ið stuðulin verður veittur; í øðrum lagi at greiða frá, hvussu stuðlað verður, og í triðja lagi at greiða frá hvør tekur avgerð um at stuðla.

Reglugerðin sigur greitt til hvønn hesin stuðulin kann verða latin og innan hvørji øki.

**Stuðul frá kommununi**

**Nýggja reglugerðin hjá Fuglafjarðar kommunu vísir, til hvønn ein kann lata stuðul. Serligar orðingar eru til hvørt av hesum punktum.**

**Stuðul kann latast til fylgjandi virksemi: ítrótt, sang og tónleik, sjónleik, list, áhugafeløg og trúarbólkar, bóka- og fløguútgávur, blaðútgávur og talgildar útgávur og uttanlandsferðir hjá skúlaflokkum og einstaklingum.**